# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



Hesin jassurin varð føddur á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn 16.mai. Hepnu foreldrini eru Rógvi A. Fossádal og Elsubeth Johannesen



13. mai fekk Sebastian ein lítlabeiggja, sum vigaði 3300 g. og var 52 cm. langur. Foreldrini eru Sára Thomsen og Sveinur Gullfoss



15 maj 2009 fingu Ronja og Emi eina lítlasystur. Hon vigaði 3300 og var 48 cm long. Foreldrini eru Durita og Heini Egholm

7.mai fingu Fanny Petersen og Bjarni Poulsen, Viðareiði ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3050 gr.

9. mai fingu Óluva Zachariassen og Arthur B. Olsen, Tórshavn tvíburðar - gentur. Onnur var 48 cm long og vigaði 2700 gr. og hin var 46 cm long og vigaði 2650 gr.

11. mai fingu Ása Jacobsen og Rói Magnussen, Tórshavn ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4450 gr.

14. mai fingu Helen Niclasen og Levi Lauritsen, Sørvágur ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3450 gr.

15. mai fingu Jóhanna og Benny Hansen, Nes eina dóttur. Hon var 54 cm. long og og vigaði 4520 gr.

15. mai fingu Kristbjørg og Joen Eriksen, Tórshavn eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3325 gr.

20. mai fingu Eydna og Poli Joensen, Tórshavn ein son. Hann var 59 cm langur og vigaði 4700 gr.

# 35 ára starvsdagur

1. mai í ár hevði Esmar Andreasen 35 ára starvsdag á gøtuljósdeildini hjá Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi var hugnalig samkoma hjá borgarstjóranum, har starvsfelagarnir hjá Esmari eisini møttu og settu dám á løtuna.

Esmar er føddur og uppvaksin í Havn. Eftir vanligu skúlagongdina varð farið til skips við trolara, men rættuliga tíðliga fór hann í elektrikaralæru hjá P/F Einar Mikkelsen.

Tá Esmar, eftir lokna útbúgving, hevði starvast sum sveinur í tvey ár bleiv hann í 1974 "lántur" frá Einari Mikkelsen til gøtuljósdeildina, og har hevur hann verið síðani.

Heðin Mortensen borgarstjóri greiddi frá um tær broytingar, sum eru hendar í kommununi á hesum øki, tey farnu 35 árini.

- Gøtuljósdeildin hevur í hesi ár hildið til í kjallaranum í Kjellneshúsi á Húsabrúgv, á Reinsaríðnum í Tórsgøtu og nú síðstu 16-17 árini úti í Torfinsgøtu 21, har margarinfabrikkin Marga og síðani bilverkstaðurin hjá Carlo Petersen hildu til. Í 1990 fór Hjørleif Hansen frá sum fyristøðufólk á deildini, og varð Esmar settur í hetta starv. Aðrir leiðarar á gøtuljósdeildini hava verið Mathias Lassen, Hjørleif Hentze og Jákup Joensen.



*Esmar Andreasen og Heðin Mortensen, borgarstjóri*

- Eingir træpelar eru eftir og ongar luftlinjur eru til stararnar at sita á. Eisini er kommunan vaksin heilt nógv, so í dag hevur Esmar saman við sínum monnum gott 8.000 gøtuljós, umframt ferðsluljós at halda skil á, segði Heðin Mortensen borgarstjóri.

Fyrst í 1990-unum var figgjarkreppa við nógvum kommunalum sparitiltøkum. Eitt av hesum tiltøkum var at leggja vatn- og gøtuljósdeildina saman í eina deild, har Viggo Christiansen hevur verið leiðari.

Borgarstjórin vísti á at í síni frítíð hevur Esmar Andreasen verið hollur stuðul í felagnum Byrsumúla, og at hann eisini fæst við málningalist. Av júst hesari orsøk handaðu starvsfelagarnir Esmari ein málning eftir Pól Skarðenni.

- Sum árini vísa, so hevur Esmar verið kommununi ein sera trúgvur starvsfelagi, og hevur hann røkt sítt starv til fulnar, segði Heðin Mortensen borgarstori at enda og handaði honum heiðursnál, blómur og báðar bøkurnar hjá Birgari Johannessen um Havnina sum gávu.

*www.torshavn.fo*

# Dugnaskapsroynd í sigling



Mikudagin var próvtøka í dugnaskapi fyri frítíðarsiglarar á Vinnuháskúlanum. Næmingarnir hava gingið ein vetur á skúlanum, har lærugreinarnar eru t.d. siglingarlæra, sjómansskapur, sjóreglur, samskifti, veðurlæra, radara og GPS. Prógvið umfatar eisini loyvi at føra skjóttgangandi bátar.

Tað er Tórshavnar Kvøld-Ungdóms- og Listaskúli, sum skipar fyri dugnaskapsroyndunum.

**Fremst f.v.:** Jákup Bærentsen, Michael Dalbø, Jógvan Sørin Hansen, Eyðbjørn Hansen, Bogi Kirke, Sjúrður Knudsen, Jóhan Mortensen, Sólja í Ólavsstovu og Magni á Deild Olsen.

**Aftara rað f.v.:** Fríðbjartur Reinert, Leivur Ree Torvadal, Jóannes Dalsgaard, Elin Hammer, Turid Jana Jacobsen, Annika Lorentzen, Carl Mouritsen, Olina Winther Skorá, Jákup Pauli Strøm og Jan M. Hjaltalin lærari.

Hesir vanta á myndini: Absalon Niclas Eysturoy, Anton Petur Jacobsen, Hans Dalsgaard og Bergur Berg.

*Mynd: Jens Kristian Vang*